# Fíggjarmálaráðið

**Løgtingið**

Dagfesting: 04. desembur 2018
Mál nr.:
Málsviðgjørt:

**Løgtingsmál nr. xx/2018: Uppskot til broyting í løgtingslóg um Búskaparráð**

**Uppskot til**

**Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um Búskaparráð**
(Fleiri tilmælandi partar og krav um arbeiðsroyndir)

**§ 1**

Í løgtingslóg nr. 50 frá 11. mai 2009 um Búskaparráð, sum broytt við løgtingslóg nr. 139 frá 20. desember 2012 verða gjørdar hesar broytingar:

**1.** § 2, stk. 1 verður orðað soleiðis:” Ráðið hevur 3 limir, sum landsstýrismaðurin setir eftir tilmæli frá ávikavist stýrinum fyri Fróðskaparsetur Føroya, nevndini í Búskapar- og Løgfrøðingafelag Føroya og nevnd Landsbankans. Tilmælandi partarnir kunnu ikki tilmæla limir úr egnari nevnd ella egnum stýri, ei heldur starvsfólk úr stovnum undir stýrinum ella nevndini.”

**2.** § 2, stk. 2 verður orðað soleiðis:” Limirnir  skulu vera búskaparfrøðingar við kandidatútbúgving frá hægri lærustovni og hava hóskandi arbeiðsroyndir sum búskaparfrøðingar.

**3.** § 2, stk. 3 verður orðað soleiðis: “Limirnir í ráðnum kunnu ikki starvast í fyrisitingini hjá landsstýrisfólkunum. Í ráðnum kann í mesta lagi vera 1 limur, sum starvast á Fróðskaparsetri Føroya.”

**4.** § 2, stk. 5 verður orðað soleiðis: “Limirnir í Búskaparráðnum verða valdir fyri eitt 4 ára tíðarskeið, sum byrjar 1. oktober 2019. Eftir 1. oktober 2019, situr eini limurin tó bert í 2 ár, og ger landsstýrismaðurin av hvør hesin er.

**§ 2**

Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.
*Stk. 2:* § 2, stk. 5 er galdandi frá 1. oktober 2019.

## Kapittul 1. Almennar viðmerkingar

### 1.1. Orsakir til uppskotið

Búskaparráðið hevur sum uppgávu at fylgja við búskaparligum viðurskiftum í landinum, koma við óheftari búskaparligari ráðgeving og frágreiðingum um búskaparligu gongdina. Umráðandi er, at væl skikkað fólk við teimum røttu førleikunum, bæði hvat viðvíkur útbúgving og arbeiðsroyndum, sita í ráðnum.

Tað hevur við verandi tilmælingarmannagongd verið avbjóðandi at fáa nøktandi tilmælir um limir í Búskaparráðið. Eisini hevur samansetingin av ráðnum til tíðir verið soleiðis, at fólk við drúgvum arbeiðsroyndum hava verið undirumboðað í ráðnum. Sambært galdandi lóg, kunnu limir sum starvast á Fróðskaparsetrinum ikki sita í ráðnum. Tað er óheppið, serliga nú Fróðskaparsetrið hevur bygt upp masterútbúgving í búskaparfrøði, og harvið sett fleiri búskaparfrøðingar í starv. Tí er neyðugt at tillaga lógina soleiðis, at tilnevningargrundarlagið gerst breiðari. Eisini verða krøv sett til at limirnir hava hóskandi arbeiðsroyndir.

Harafturat verður búskaparráðið valt tann 1. januar, sum er miðskeiðis millum konjunktur-frágreiðingarnar. Tað er óheppið, tí tað órógvar arbeiðið við konjunkturfrágreiðingunum. Skotið verður tí upp, at Búskaparráðið verður valt 1. oktober heldur enn 1. januar. Eisini verður skotið upp, at tað annaðhvørt ár verður valdur 1, og annaðhvørt ár 2 limir í ráðið. Ásetingin tryggjar størri framhald (kontinuitet) í ráðnum.

### 1.2. Galdandi lóggáva

Í løgtingslóg nr. 50 frá 11. mai 2009 um Búskaparráð, sum broytt við løgtingslóg nr. 139 frá 20. desember 2012, er ásett, at stýrið fyri Fróðskaparsetur Føroya einsamalt tilmælir limirnar til Búskaparráðið. Eisini er ásett, at limirnir í ráðnum ikki kunnu starvast á Fróðskaparsetrið Føroya. Hendan avmarkingin í mun til hvør kann innstillast at verða limur í búskaparráðnum er mett at verða óheppin, tá alsamt fleiri búskaparfrøðingar starvast á Fróðskaparsetrinum. Tað er tí hóskandi at gera tað møguligt hjá hesum at sita í Búskaparráðnum.

Eingi krøv eru í verandi lóg um, at limirnir í ráðnum hava viðkomandi arbeiðsroyndir.

Í verandi lóg er ásett, at valskeiðið er 4 ár og at ráðið verður valt 1. januar, sum er miðskeiðis millum báðar konjunkturfrágreiðingarnar, sum ráði ger. Tað órógvar arbeiðið við konjunkturfrágreiðingunum, at nýggir limir taka sæti miðskeiðis millum báðar frágreiðingarnar, og tí hevði verið betur, um valskeiði í staðin var frá 1. oktober at rokna.

### 1.3. Endamálið við uppskotinum

Endamálið við uppskotinum er at breiðka tilnevningargrundarlagið, soleiðis at tað framyvir verða 3 partar ið tilnevna hvør sín lim til Búskaparráðið, nevniliga stýrið fyri Fróðskaparsetur Føroya, Búskapar- og Løgfrøðingafelag Føroya og nevnd Landsbankans. Eisini verður møguligt at tilevna limir til Búskaparráðið, ið starvast á Fróðskaparsetri Føroya. Hervið verða

fleiri búskaparfrøðingar sum kunnu tilnevnast sum limir og harvið verður eisini léttari at manna Búskaparráðið. Mælt verður til, at í ráðnum kann í mesta lagi vera 1 limur sum starvast í Fróðskaparsetri Føroya – hetta fyri at tryggja at limirnir hava ymiskar bakgrundir.

Endamálið við uppskotinum er eisini at broyta valskeiðið hjá Búskaparráðnum frá 1. januar til 1. oktober ístaðin. Hetta hóskar betri til arbeiðið hjá Búskaparráðnum, sum letur sínar konjunkturfrágreiðingar 1. oktober og 1. mars.

Endaliga er ynskiligt at manna Búskaparráðið við limum, ið hava hóskandi arbeiðsroyndir sum búskaparfrøðingar og tí verður hetta ein treyt framyvir.

**1.4. Samandráttur av nýskipanini við uppskotinum**

Uppskotið hevur við sær, at tilnevnandi partarnir økjast frá einum upp í tríggjar. Búskaparfrøðingar, ið starvast á Fróðskaparsetri Føroya, kunnu tilnevnast í Búskaparráðið og er hetta ein fyrimunur, bæði tí at so verður tað ein størri skari av búskaparfrøðingum sum kunnu tilnevnast, og tí at alsamt fleiri búskaparfrøðingar við góðum fakligum førleikum arbeiða á Fróðskaparsetrinum. Krav verður eisini sett til, at limirnir hava hóskandi arbeiðsroyndir.

Harafturat er endamálið at broyta valskeiðið soleiðis, at Búskaparráðið verður valt 1. oktober heldur enn 1. januar, tí hetta hóskar betur til arbeiðið hjá ráðnum. Eisini verður skotið upp, at tað annaðhvørt ár verður valdur 1, og annaðhvørt ár 2 limir í ráðið. Ásetingin tryggar størri framhald (kontinuitet) í ráðnum.

| Ár | 2019 | 2020 | 2021 | 2022 | 2023 | 2024 | 2025 | 2026 | 2027 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Búskaparráðið, tal av limum fyri vali | 3 | | 1 | | 2 | | 1 | | 2 |

**1.5. Ummæli og ummælisskjal**

Ummælini verða løgd við sum fylgiskjøl til lógaruppskotið.

## Kapittul 2. Avleiðingarnar av uppskotinum

### 2.1. Fíggjarligar avleiðingarnar fyri land og kommunur
Lógaruppskotið hevur ongar avleiðingar fyri land og kommunur.

### 2.2. Umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur
Lógaruppskotið hevur smávegis umsitingarligar avleiðingar fyri umsitingina í fíggjarmálaráðnum, nú limir skulu veljast í búskaparráðið annað hvørt ár ístaðin fyri triðja hvørt ár.

### 2.3. Avleiðingar fyri vinnuna
Lógaruppskotið hevur ongar fíggjarligar ella umsitingarligar avleiðingar fyri vinnuna.

### 2.4. Avleiðingar fyri umhvørvið
Lógaruppskotið hevur ongar avleiðingar fyri umhvørvið.

### 2.5. Avleiðingar fyri serstøk øki í landinum
Lógaruppskotið hevur ikki serligar fíggjarligar, umsitingarligar ella umhvørvisligar avleiðingar fyri serstøk øki í landinum.

### 2.6. Avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir
Lógaruppskotið hevur ikki avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir.

### 2.7. Millumtjóðasáttmálar á økinum
Tað eru ongir millumtjóðasáttmálar á økinum.

### 2.8. Tvørgangandi millumtjóðasáttmálar

### 2.9. Marknaforðingar
Tað eru ongar marknaforðingar á økinum.

### 2.10. Revsing, útpanting, sektir ella onnur størri inntriv

### 2.11. Skattir og avgjøld
Uppskotið hevur ikki ásetingar um skattir ella avgjøld.

### 2.12. Gjøld
Uppskotið hevur ikki ásetingar um gjøld .

### 2.13. Áleggur lógaruppskotið fólki skyldur?
Nei.

**2.14. Leggur lógaruppskotið heimildir til landsstýrismannin, ein annan enn landsstýrismannin ella til kommunur?**
Nei.

**2.15. Gevur lógaruppskotið almennum myndugleikum atgongd til privata ogn?**
Nei.

**2.16. Hevur lógaruppskotið aðrar avleiðingar?**
Nei.

**2.17. Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum**

| | Fyri landið ella landsmyndug-leikar | Fyri kommunalar myndugleikar | Fyri pláss ella øki í landinum | Fyri ávísar samfelags-bólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|---|
| Fíggjarligar ella búskaparligar avleiðingar | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Umsitingarligar avleiðingar | Nei | Ja | Nei | Nei | Nei |
| Umhvørvisligar avleiðingar | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Sosialar avleiðingar | | | Nei | Nei | |

## Kapittul 3. Serligar viðmerkingar

### 3.1. Viðmerkingar til ta einstøku greina

**Til § 1**

**Til nr. 1**
Broytingin inniber, at tríggir partar skulu tilnevna limir til landsstýrismannin, nevniliga stýrið fyri Fróðskaparsetur Føroya, Búskapar- og Løgfrøðingafelag Føroya og nevnd Landsbankans. Tilmælandi partarnir kunnu ikki velja limir úr egnari nevnd ella egnum stýri í Búskaparráðið. Tilmælandi partarnir kunnu heldur ikki tilmæla limir úr stovnunum undir ráðnum. Soleiðis kann t.d. nevndin i Landsbankanum ikki tilnevna starvsfólk úr Landsbanka Føroya. Einki er tó til hindurs fyri, at partarnir tilmæla limir hjá hvørjum øðrum. T.d. kann BLF tilmæla limir í landsbankanevndini og øvugt.

Búskaparráðið er alment ráð og fevnt av løgtingslóg nr. 52 frá 3. mai 1994 um javnstøðu millum menn og kvinnur. Upplagt er tí, at tilnevnandi partar samskifta sínámillum um tilmælini, soleiðis at ásetingarnar í javnstøðulógini verða hildnar.

**Til nr. 2**
Broytingin inniber, at limirnir í Búskaparráðnum – umframt kandidatútbúgving í búskaparfrøði – eisini skulu hava hóskandi arbeiðsroyndir sum búskaparfrøðingar. Hetta er ynskiligt, tí búskaparráðið, ið bert telur tríggjar limir, ger tvær konjunkturfrágreiðingar árliga og tí er umráðandi at limirnir hava góðar fakligar førleikar og hóskandi arbeiðsroyndir. Fólk sum koma beinleiðis av skúlabeinki, og ikki hava munagóðar arbeiðsroyndir, verða sostatt ikki mett væl egnað at sita í ráðnum.

**Til nr. 3**
Broytingin inniber, at nú verður møguligt at tilnevna limir til Búskaparráðið, sum starvast á Fróðskaparsetri Føroya. Tað kann tó í mesta lagi vera 1 av 3 limum í ráðnum, sum starvast á Fróðskaparsetri Føroya – hetta fyri at tryggja at limirnir hava ymiskar bakgrundir.

**Til nr. 4**
Ásetingin snýr seg um at broyta valskeiðið, soleiðis at limirnir verða valdir 1. oktober heldur enn 1. januar. Tað hevur víst seg at órógva arbeiðið hjá Búskaparráðnum við konjunkturfrágreiðingunum, at ráðið verður valt miðskeiðis í millum báðar frágreiðingarnar. Eisini verður skotið upp, at tað annaðhvørt ár verður valdur 1, og annaðhvørt ár 2 limir í ráðið. Ásetingin tryggar størri framhald (kontinuitet) í ráðnum.

| Ár | 2019 | 2020 | 2021 | 2022 | 2023 | 2024 | 2025 | 2026 | 2027 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Búskaparráðið, tal av limum fyri vali | 3 | | 1 | | 2 | | 1 | | 2 |

**Til § 2.**

Áseting um gildiskomu og skiftisreglu, har broytta valskeiðið sum verður at rokna frá 1. oktober kemur í gildi 1 .oktober 2019.

Fíggjarmálaráðið, 04.12.2018.

**Kristina Háfoss**
landsstýriskvinna

/ Bjarni Askham Bjarnason